## Skoda Roomster



Á bilaframsýningini í Frankfurt var Skoda konseptbilurin Roomster, sum er bygdur yvir sama plattform sum VW Touran. Við tað at baksetrið kann flytast heilar 75 cm, kann man velja ímillum stórt viðførisrúm ella sera gott beinplass aftan

*Kelda: Bil Magasinet*

## Daewoo Lacetti



Ein nýggjur Daewoo Lacetti kemur á marknaðin komandi ár. Bilurin fær m.a. 1,8 litur motor við 122 hk, og regnsensor og airconditon verða standardútgerð

*Kelda: Motor Magasinet*

## Subaru G3X Justy



Nýggi Subaru G3X Justy 4x4 er í veruleikanum nýggjasta modell av Suzuki Ignis. Motorskráin byrjar við einum 1,3 litur bensinmotori við 94 hk

*Kelda: Motor Magasinet*




*Soleiðis virkar ISA (Intelligent Speed Adaption)*

# Á veg móti Null-hugsjónini

**Nú gott tvey ár eftir at eitt fullsett flogfar av føroyingum vóru í Trollhättan í Svøríki og royndu nógv umrøddu Null-hugsjónarbreytina, var tíðindafundur seinasta hósdag á Ferðslutrygd, har høvi var at koyra ein bil við fylgisveinastýrdum ferðavmarkara**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nú hava vit í nøkur ár hoyrt um Null-hugsjónina, sum byrjaði í Svøríki í 1997. Aðalmálið við hesi hugsjón er, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni. Hóast tað er trupult at náa hesum máli, verður alla tíðina arbeitt fram móti endamálinum við Null-hugsjónini.

Fyri tveimum árum síðan vóru 85 føroyingar frá ymiskum stovnum, feløgum og fjølmiðlum í Trollhättan í Svøríki, har tey vórðu kunnaði um Null-hugsjónina og sluppu at royndakoyra bilar á einum 40 km longum vegastrekki, har stórur dentur varð lagdur á, at vegurin var so ferðslutryggur sum gjørligt. Talan var um eina verkætlan, sum var gjørd í samstarvi millum land og kommunu, svenska ráðið fyri ferðslutrygd og Saab bilaverksmiðjuna.

Á hesum strekki var tað soleiðis at um man t.d. koyrdi við eini ferð uppá 80 km/t og kom til eina ferðslutalvu sum vísti 50 km/t, bleiv spitarin tyngri at trýsta á, inntil ferðin kom niður á 50 km/t. Tað sama var galdandi, um man koyrdi við 50 km/t og kom til eina ferðslutalvu, sum vísti 30 km/t, spitarin bleiv tyngri at trýsta á. Alt hetta varð stýrt av fylgisveini.

### Intelligent Speed Adaption

Nú tvey ár seinni varð høvi at royndarkoyra ein Kia Sportage hjá Ferðslutrygd í Havnargøtum við hesi skipan.

ISA (Intelligent Speed Adaption) útgerð er sett í bilin í Svøríki. Skipanin virkar á tann hátt, at um koyrt verður skjótari enn fyriskrivað í einum avísum øki, so gerst spitarin tyngri at trýsta á. Búgvi Apol, frá Bileftirlitinum í Føroyum, og Jón Kragesten frá Ferðslutrygd, vóru til staðar tá útgerðin varð sett í bilin.

Í samstarvi við Tórshavnar Býráð eru nøkur ávís vagastrekkir í býnum kodaði inn í eina stýrieind í bilinum, soleiðis at um bilurin koyrir skjótari enn t.d. 50, 40, 30, ella 15 km/t, alt eftir hvat tey ávísu strekkini eru kodaði inn til, verður spitarin tyngri at trýsta á, til ferðin er komin niðri á tað, sum skipanin er kodað inn til. Fylgisveinurin veit alla tíðina, hvar bilurin er staddur.

Tekniskt letur tað seg gera at útbyggja eina slíka skipan til at umfata allar vegir í landinum. Men í fyrstu atløgu er bert talan um eitt upplýsandi átak hjá Ferðslutrygd fyri at ávirka politikkarar og kommunustýrislimir.

Vinnumálaráðið fyrireikar nú eitt uppskot til samtyktar um Null-hugsjónina. Uppskotið kemur fyri løgtingið í november.



*Jón Kragesten, leiðari á Ferðslutrygd, og Búgvi Apol, frá Bileftirlitinum, við Kia bilinum við fylgisveinastýrdum ferðavmarkara*




# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**CITROEN ZX 1.9D STC.**
Árg Nov . 1996, Km 153.000.
Kr. 62.000.

**CITROEN XSARA 1.6I 5H**
Árg Aug. 1998, Km 70.000.
Kr. 99.000.



**CITROEN XSARA 2.0HDI 5H**
Árg Mei-00, Km 82.000.
Kr. 135.000. **Nýsýnaður**



**CITROEN XANTIA 1.9TD STC.**
Árg Des. 1998, Km 101.000. *Prísur fyrr kr 140.000* – **Nú** Kr. 135.000.
**Sýnaður í september 2003**



**MITSUBISHI GALANT 1.8 4H**
Árg Jun-89, Km 165.000. *Prísur fyrr kr 45.000* – **Nú** kr 30.000.



**FORD FOCUS 1.8TDI 5H**
Árg Aug-99, Km 62.000.
Kr. 135.000.



**FORD MONDEO 1.8I 5H**
Árg Mei-96, Km 87.000.
Kr 75.000.



**MITSUBISHI L300 COSMOS 4X4**
Árg Aug. 1996, Km 106.000.
Kr. 90.000.



**OPEL COMBO 1.4I VAN**
Árg Apr-98, Km 53.000.
Kr. 65.000.
**Sýnaður 2003 v/mvg**



**TOYOTA HIACE 2.4D AUT.**
Árg Mei-99, Km 104.000. *Prísur fyrr kr 150.000* – **Nú** kr 140.000.
**v/mvg**

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
**Ivan Johansen Bilar**
**Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo**



**MERCEDES BENZ 230 TE 7 PERSÓNA STATIONCAR.**
Árg Jun-91, Km 117.000. Rúmligur 7 persónabilur familjubilur til sølu.

Bilurin er í sera góðum standi. Nýsýnaður, eyka felgur við píkadekkum fylgja við, nýtt útstoyt (komplett), nýggjur akkumulator, nýggjar bremsuskivur framman og nýggjar el-rútavindarar. Søluprísur kr. 149.000.
**Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 216135**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 SOL**
Árg feb.2000, Bilurin er silvurgráur og hevur koyrt 20.500 km.
Prísuppskot: kr 165.000,-.
**Tel. 211950 ella 317565**



